## Surfa undan strongdini

Ein donsk kanning vísir nú, at tað er ikki spill av tíð, tá starvsfólk nýta arbeiðstíðina til eisini at surfa á internetinum í privatum ørindum. Úrslitið av kanningini er somikið greitt, at tað nú verður sagt, at arbeiðsgevarar eiga at eggja starvsfólkum til at nýta einar 10 minuttir um dagin til at surfa í privatum ørindum. – Tað minkar ikki um arbeiðssemið. Tvørtur ímóti økist produktiviteturin, og strongdin minkar eisini, verður staðfest í kanningini, sum Mind Lab International hevur gjørt. Í kanningini vórðu kvinnur í sjey europiskum londum kannaðar, og úrslitið var einvíst, at frí og óbundin surfing hevur somu positivu árin á strongd og heilavirksemið annars sum eitt lítil blundur ella sokallaður power-nap hevur.



## Øl verður dýrari

Í ársroknskapinum fyri 2007 skrivar Carlsberg, at øl verður ein dýrari vøra í 2008, enn hon annars hevur veirð. Øktir kostnaðir fyri malt, humlu og frakt trýsta bryggjaríini kring allan heimin, og tí fer prísurin á lidnu vøruni eisini at hækka. Og danir merkja longu nú prísvøkstur á grønu fløskunum. Soleiðis er tilboðsprísurin á Carlsberg og Tuborg nú 105 kr. fyri kassan. Í fjør var hesin niðri á 70-75 kr. fyri kassan.

# Trist at koma til Skopunar



*Fýra av stjórunum, sum verið hava á fiskavirkinum í Skopun, f.v.: Gunnleif Hentze, Esmar Simonsen, Símun Joensen og Egil Olsen. Teir, sum Magnus Jespersen*

**Egil Olsen, sum er í nevndini í Sandoy Seafood og hevur verið ein av stjórunum á virkjunum í oynni, sigur, at tað var trist at koma til Skopunar, eftir at virkini í oynni høvdu ligið still. – Her var einki fólk at síggja, og tað virkaði, sum um fólk ikki trúðu uppá, at virksemi kundi blíva aftur í oynni**

MÓTTØKA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosalurin.fo*
*Myndir: Álvur Haraldsen*

At samanhaldið í Skopun er stórt, var dagurin í gjár eitt týðiligt tekin um. Nógv fólk nýttu høvið at vitja inn á gólvið á fiskavirkinum, nú 40 ár eru liðin, síðan fyrstu kassarnir við fiski komu inn á gólvið til virkingar. Síðan henda dag eru nógv tonsini virkað, bæði við hond, sum tað var í byrjanini – og seinni við effektivum maskinum.

Uppi í stóru gongini hingu áhugaverd skjøl og myndir frá teirri fyrstu tíðini í søgu felagsins – og enntá undan henni, og longur inni á gongini hingu myndir og ymisk greinaklipp, ið lýsa ein part av søguni aftan fyri Sólarris, sum var navnið á virkinum gjøgnum mong ár.

Tú kundi gingið leingi og hugt at skjølum, myndum og ymiskum greinaklippum, men inni í matarhøllini byrjaði skjótt tann almenni parturin av móttøkuni. Fleiri fólk høvdu ymiskt upp á hjarta, sum tey fegin vildu bera fram, nú 40 ár eftir sjálvan stovningardagin.

Og tó.

Stundir vóru til at kaga eitt lítið sindur – ella, tú kundi ikki annað, tá ið hetta tilfar kortini hekk har til tað sama.

### Hol í høvdið

Sjálvandi siga myndirnar teimum mest, sum eru við á teimum og familjum teirra, og tað vísti seg eisini, at tey mongu, sum høvdu leitað sær inn á virkið seinnapartin í gjár, høvdu stóran áhuga í hesum partinum.

Onnur sóu nøvnini á sínum núlivandi og farnu forfedrum, ið slóðaðu fyri, á skjølum, og tú hevði ta kenslu, at hetta vóru fólk, sum rættiliga høvdu lagt lív og sál í at reisa hetta virksemi á føtur. Í summum førum hava menn persónliga veðhildið fyri lánum fyri at skapa trivnað og møguleikar í bygdini.

Tað er Fríðhild Winther, sum sjálv hevur verið knýtt at virkinum í mong ár, sum við góðum stuðli frá fólki hevur savnað tilfar til framsýningina.

Í einum av greinaklippunum, sum er úr Sosialinum frá 10. januar í 1982, sigur táverandi virkisleiðarin í Skopun, Harry Hentze, at "tað er hol í høvdið at byggja eitt flakavirki á Sandi". Hann vísir á, at rávørugrundarlagið er ov lítið – og heldur ikki er fólk til tvey flakavirki í oynni.

Tað er menniskjansligt at verja um tað, tú hevur, og hugsandi hevur Harry væntað, at fingu sandingar eisini sítt virki, fór hetta at ganga útyvir ráfiskagrundarlagið í Skopun.

Nú so nógv verður tosað um livur og mistar inntøkur í hesum sambandi – ja, miljardir, sum onkur hevur ført fram, duttu vit eisini á eina áhugaverda "vektnotu" í gongini á fiskavirkinum.

Hetta er ein vektnota frá 26. mars í 1952. Tá hevur útróðrarbáturin Vørður avreitt til Firma Jens M. Poulsen. Nøgdin av toski er 2490 pund, hýsa telir 220 pund og smáfiskur 400 pund.

Tað, sum er áhugavert við hesi vektnotu, er, at Vørður hendan várdagin í 1952 eisini hevur avreitt 100 pund av livur. Hetta merkir, at meðan handilsmaðurin í Skopun keypti livur fyri meira enn 55 árum síðan, gongst illa hjá bátum at sleppa av við livur fyri líkinda prís í dag.

Fyrsta treytin fyri, at skip og bátar skulu taka livur er, at teir kunnu fáa nakað fyri hana, og so seint sum í gjár høvdu vit samband við reiðara, sum segði, at livurin, sum hann hevði sent á fiskamarknaðin um dagarnar, als ikki varð keypt!

Tí noyðast teir, sum rópa upp um miljardir fyri livratøku og livrasølu, eisini at hava okkurt hugskot um,



*Marner Lisberg og Fríðhild Winther*